# Kundavegleiðing

## UM FULNAÐ OG HEILSUUPPLÝSINGAR

betri pensjón

Fyri tryggingar, teknaðar í Betri Pensjón, eru tær til eina og hvørja tíð galdandi "Almennar Tryggingartreytir" og "Tryggingartreytir fyri Bráðsjúkutrygging" galdandi. Somuleiðis fylgja tryggingarnar ásetingunum í Tryggingaravtalulógini og føroysku lóggávuni annars.

### Tá tú ynskir at tekna ella broyta eina trygging

Eru upplýsingarnar nøktandi og Betri Pensjón góðkennir tryggingina til vanligar treytir, tekur tryggingin við, so skjótt vit hava móttikið skjølini ella seinni, um tú hevur ásett eina dagfesting.
Tá vit meta um tína áheitan um trygging, kunnu ymisk viðurskifti gera, at tryggingin ikki tekur við beinanvegin. Orsøkin kann vera, at áheitanin ikki er innan fyri vanligu reglurnar hjá Betri Pensjón – td. um tørvur er á fleiri heilsuupplýsingum, áðrenn áheitanin kann viðgerast.

### Hví skalt tú lata upplýsingar um tína heilsu?

Ynskir tú at tryggja teg og tína familju, hevur Betri Pensjón tørv á, at tú svarar spurningum um tína heilsu. Betri Pensjón átekur sær ein fíggjarligan váða, tá ið tú teknar eina trygging, og hava vit tørv á at kenna tíni heilsuviðurskifti, so treytirnar fyri tryggingina kunnu ásetast.

### Váði og kostnaður

Eru upplýsingarnar ikki rættar, kann hetta føra við sær, at tú rindar ein skeivan kostnað og/ella fyri eina skeiva trygging. Í ringasta føri er vandi fyri, at fulnaður/endurgjald ikki fæst, um skaðin hendur. Hevur tú td. ryggtrupulleikar ella hjartatrupulleikar, er vandin fyri at gerast óarbeiðsfør/ur ella doyggja hægri. Tín trygging verður tí ásett eftir tínari heilsu.

### Fyrivarni (klausul) í tryggingini

Í ávísum føri ber til at seta fyrivarni í eina trygging. Hetta førir við sær, at tú kanst rinda vanligan kostnað, men tú fært ikki fulnað/endurgjald, um tú verður óarbeiðsfør/ur ella sjúk/ur orsakað av tí, sum fyrivarni er tikið fyri.

### Hvørjar heilsuupplýsingar skalt tú lata?

Tá ið tú útfyllir heilsuskjølini, er tað sera umráðandi, at tú

- Svarar øllum spurningum til fulnar
- Upplýsir um núverandi sjúkur
- Upplýsir um fyrrverandi sjúkur
- Upplýsir um varandi ella fyribils nýtslu av heilivági
- Upplýsir um allar kanningar og viðgerðir hjá lækna, kiropraktori, fysioterapeuti, sálarfrøðingi við fleiri

### Ábyrgdin er tín og bert tín

Sjúkur og avbjóðingar, ið ikki eru eins sjónligar sum aðrar – so sum ryggtrupulleikar – verða ofta undirmettar, eins og nýtsla av heilivági ella rúsdrekka verða duldar burtur. Eisini kann ein ivast í, um okkurt ávíst skal nevnast so sum sálarligar avbjóðingar ella kynssjúkur. Fyri at tryggja teg sjálvan, skalt tú altíð nevna øll viðurskifti, tú minnist – eisini um tú heldur, at tað ongan týdning hevur fyri tína trygging. Ábyrgdin av, at oyðublaðið verður útfylt rætt, er tín og bert tín.

### Ivast tú?

Ert tú í iva um, hvussu tú skalt svara spurningunum ella um tú hevur fingið alt við, kanst tú seta teg í samband við tín lækna, áðrenn tú fyllir skjølini út. Læknin hevur ofta upplýsingarnar í tínari sjúkradagbók. Møguligt gjald hjá læknanum til hetta, verður ikki goldið av Betri Pensjón. Tað er ikki vist, at tín lækni hevur allar upplýsingar, um tú hevur skift lækna el.l, men ábyrgdin, at fáa allar viðkomandi upplýsingar við, liggur hjá tær.
Um tú seinni kemur í tankar um okkurt, tú hevur gloymt at upplýsa, skalt tú venda tær til Betri Pensjón skjótast gjørligt.
Tú skalt tó ikki upplýsa um úrslit av íleguroyndum, sum eru gjørdar fyri at nágreina vandan fyri at fáa onkrar ávísar sjúkur í framtíðini (prædiktive genetiske tests) ella um luttøku í og úrslit av fyribyrgjandi kanningum, tá hesar ikki vísa tekin uppá sjúku.

### Viðkvæmar upplýsingar

Tú kanst trygt lata viðkvæmar upplýsingar til Betri Pensjón. Bert tey, ið skulu viðgera títt mál, síggja tínar upplýsingar, og øll hava tagnaðarskyldu sambært lógini. Um tú ynskir tað, kanst tú lata viðkvomu upplýsingarnar í einum afturlatnum brævbjálva, merktan "Heilsa" til Betri Pensjón.

### Hvat hendir við mínum heilsuupplýsingum?

Tínar heilsuupplýsingar skulu latast til Betri Pensjón, tá tú ynskir at tekna ella broyta eina trygging. Kunnu heilsuupplýsingarnar góðkennast beinanvegin, tekna vit tær tryggingina beinanvegin til vanligar treytir.
Um tær bagir okkurt ella um tú fyrr hevur bagt okkurt, biðja vit sannlíkt um fleiri heilsuupplýsingar frá tær og/ella tínum lækna ella øðrum viðgera.
Eru viðurskifti, sum vit ynskja nágreinaði meira, kunnu vit eisini biðja um upplýsingar frá serlækna ella biðja um fleiri kanningar.
Tá ið vit hava tikið støðu til tína áheitan um trygging, kanst tú fáa boðið eina trygging til vanligar treytir og gjald ella eina trygging, har tíni heilsuviðurskifti geva eitt hægri tryggingargjald. Tað kann eisini vera, at vit ikki hava møguleika at bjóða tær eina trygging, sum støðan er.

### Trygg meting

Eins og í nógvum øðrum tryggingarfeløgum, nýta vit eitt hagfrøðiligt grundarlag fyri okkara metingum, sum samstarvsfelagi okkara, Videncenter for Helbred & Forsikring, hevur gjørt og leypandi dagførir við at heinta nýggjar upplýsingar inn, sum hava týdning fyri meting av heilsuupplýsingum. Á henda hátt er vitanin á økinum altíð dagførd.
Við útgangsstøði í hesum upplýsingunum, kann Betri Pensjón grunda avgerðir okkara á eitt læknafakligt og hagfrøðiligt grundarlag, og tryggjar hetta eina einsháttaða og objektiva meting av tínum heilsuviðurskiftum.

### Eyka upplýsingar

Tá ið tú útfyllir og undirskrivar eina áheitan um trygging, skalt tú eisini undirskriva eitt samtykki, ið er saman við heilsuskjalinum. Samtykki gevur Betri Pensjón heimild at heinta inn upplýsingar um teg frá kommunulækna, sjúkrahúsum og øðrum viðgerum. Heimildin, at heinta upplýsingar við samtykkinum, er galdandi í eitt ár.

### Um skaðin hendir

Um skaði hendir og søkt verður um útgjald frá tínari trygging, kann Betri Pensjón heinta upplýsingar um tíni heilsuviðurskifti. Í hesum sambandi kunnu vit, við loyvi frá tær ella tínum avvarðandi, biðja um upplýsingar frá lækna, serlækna og sjúkrahúsi. Heilsuupplýsingarnar verða samanbornar við heilsuskjølini, sum tú hevur útfylt, tá ið tú teknaði tryggingina.
Hetta tryggjar, at endurgjald bert verður veitt til tey, ið hava rætt til endurgjald.

### Endurgjald

Møguligt endurgjald verður útgoldið beinanvegin, um heilsuskjølini eru røtt. Hevur tú givið ósannar heilsuupplýsingar, tá ið tryggingin er teknað, kann títt endurgjald verða lækkað ella í ringasta føri fella burtur. Hetta hendir, um vit ikki høvdu havt góðkent tryggingina undir vanligum treytum og til vanligt gjald, høvdu vit havt røttu heilsuupplýsingarnar. Hetta er eisini galdandi, um tú seinni søkir um endurgjald fyri eina aðra sjúku. Í eyka grovum førum er tað revsivert at geva skeivar ella ófullfíggjaðar upplýsingar.
Tað hevur ongar fylgjur fyri eitt møguligt endurgjald, um tey skeivu ella ófullfíggjaðu svarini ikki hava týdning fyri treytirnar, tín trygging er teknað á.